## Pisur og hægri lesnaður



Ungdómsdeildin hjá Eik við SMS verður týskvøldið 7. august karmur um Pisudagin 2007. Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum Meginfelag Føroyskra Studenta saman við Altjóða Skrivstovuni og Eik skipa fyri á hvørjum ári, og er hetta tiltak ætlað teimum, ið ætla sær undir hægri lesnað. Tiltakið byrjar kl. 19.30 og á skránni vera framløgur frá teimum nýggju geografisku MFS-nevndunum, sum saman við Altjóða Skrivstovuni fara at greiða frá um ymisk praktisk viðurskifti, sum hugsast skal um, tá farið verður undir hægri lesnað. Eftir framløgurnar verður tónleikur við Høgna Reistrup umframt okkurt ábit, og møguleiki fyri at seta spurningar.

## Hent heimasíða hjá lesandi

Føroyahúsið hevur fingið nýggja og snøgga heimasíðu. Har verður greitt frá teim tiltøkum, ið eru á skránni, frá feløgum í húsinum, frá virkseminum í húsinum annars og ein kann t.d. eisini tekna seg at fáa tíðindabræv. Ikki minst er heimasíðan hent hjá teimum, sum í hesum døgum leita sær til Keypmannahavnar í lestrarørindum á fyrsta sinni. Hjá teimum er ráðgevingin í ´húsinum óivað hent. Á sølutorginum ber nevniliga til at keypa og serlja og har eru eisini íbúðir nevndar. Tey, ið byrja útisetalív, kunnu leita á www.faroehouse.dk

# Løvubetong veksur virksemið

**Løvubetong byggir út, soleiðis at teir kunnu fara undir at framleiða betongelementir. Íslendsku eigararnir innflyta frammanundan nógv elementir til Føroya**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Í løtuni er Løvubetong betongblandistøð og sementheilsøla, men fyrst í komandi ári fevnir virksemi teirra ætlandi eisini um framleiðslu av betongelementum*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Tað var í novembermánaði í fjør, at íslendingar keyptu Løvubetong við Norðskála. Tá segði nýggi eigarin, at ongar broytingar komu her og nú, men at ætlanir vóru at vaksa um virksemi hjá Løvubetong. Nú er greitt, at virksemið verður útbygt, soleiðis at Løvubetong um eitt hálvt ár ella so, eisini fer at framleiða betongelementir.

– Vit útbyggja nú soleiðis, at Løvubetong eisini verður eitt elementvirkið, sum fer at framleiða betongelementir. Væntandi stendur bygningur liðugur um árskiftið, so vit kunnu fara undir at framleiða elementir tá, sigur Regin Johannesen, sum tók við sum stjóri í junimánaði í ár.

Í løtuni er Løvubetong betongblandistøð og sementheilsøla, men fyrst í komandi ári fevnir virksemi teirra ætlandi eisini um framleiðslu av betongelementum.

### Innflyta frammanundan til Føroya

Tað er íslendingurin Þorvaldur Gissurarson, sum keypti Løvubetong. Hann er forstjóri í íslendsku byggifyritøkuni TG Verk, ið hevur umleið 200 mans í arbeiði og hvørt virksemi er vaksið nógv seinastu árini. Av størru verkætlanum teirra kunnu vit nevna, at teir hava staðið aftanfyri bygginginavprentsmiðjuni hjá Morgunblaðnum, sum er tann størsta í Íslandi. Somuleiðis hava teir staðið aftanfyri byggingini av høvuðsskrivstovuni hjá orkuveitingini í Reykjavík og størstu byggivørugoymsluna, sum fyritøkan við heitinum Húsasmiðjan lat byggja.

TG-Verk eigur eisini stóra elementvirkið Einingaverksmiðjan, sum frammanundan innflytur nógv elementir til Føroya. Við at hava eitt elementvirki í Føroyum spara teir pening, umframt at teir koma inn á ein markna, har stórur eftirspurningur er.





NÁTTARBUSSAR

Skipað verður fyri eyka bussambandi á Summar Festivalinum. Náttarbussar koyra frá parkeringsøkinum við KÍ-høllina. Samband verður til Eysturoynna, Havnar, Vestmanna og Vágarnar.

**Bussarnir koyra soleiðis:**

- Hóskvøldið: Kl. 03.00
- Fríggjakvøldið: Kl. 05.00
- Leygarkvøldið: Kl. 05.00

**Bílegging:**

- Eysturoy og Havnar: Tlf. 505220
- Vestmanna og Vágar: Tlf. 424254 ella 217752